**Byrjunarskeið Fyrstahjálp**

**Lær 1. Hjálp!**

Skeið byrjar 1. august kl. 19:00

Síðan 4. og 5. august

Tilmelding á tlf. 283630 ella Redcross@redcross.fo

Prógvið er eisini galdandi í Danmark

**Reyði Krossur Føroya**

i Sosialurin



# HTU-leiðari

*Heilsa, trygd og umhvørvi*

SEV er eitt dygdargott elfelag, ið arbeiðir á einum høgum støði, tá ið tað snýr seg um heilsu, trygd og umhvørvi bæði innan- og uttanhýsis. HTU-økið er í støðugari menning, og HTU-leiðarin skal samskipa og ganga á odda fyri hesi menning.

Vit søknast eftir einum HTU-leiðara, sum hevur góð samstarvsevnir, ein jaligan hugburð, dugir at bera fram síni sjónarmið og boðskapir, og megnar at hava fleiri bóltar í luftini ísenn.

Ráðgeving og samskipan eru lyklauppgávur. HTU-leiðarin skal ráðgeva leiðslu og starvsfólkum í HTU-spurningum og samskipa undirvísingina á økinum. Hetta inniber m.a. umsiting av okkara trygdargóðskuskipan TGS.

Uppgávurnar hjá HTU-leiðaranum verða millum annað at dagføra og gera mannagongdir og politikk innan HTU-økið, at luttaka í verkætlanum har heilsa, trygd og umhvørvi hava ein leiklut og vera við í arbeiðinum at gera umhvørvisgóðkenningar.

Vit ynskja at tú hevur viðkomandi útbúgving, t.d. er verkfrøðingur, hevur royndir innan arbeiði við heilsu, trygd og umhvørvi, megnar at greina hagtøl, skipa vitan og líknandi og er uppsøkjandi.

Talan er um eitt nýtt starv. HTU-leiðarin hevur tilvísing til stjóran, og starvið er lønt sambært sáttmála millum SEV og avvarðandi yrkisfelag.

Hevur tú hug at taka av hesi avbjóðing, er tú vælkomin at senda umsókn við prógvum og øðrum til SEV. Freistin at søkja er mánadagin 25. august 2008 kl. 12.

Hevur tú spurningar, er tú vælkomin at ringja til Hákun Djurhuus, stjóra á telefon 346800.

## 2 størv hjá SEV leys at søkja

# Maskinverkfrøðingur

Innan Tøknideildina hjá SEV er Verkfrøðingadeildin sjálvstøðug deild, har yrkini maskin-, byggi- og elverkfrøði eru umboðaði. Á deildini starvast 7 verkfrøðingar. Deildin stuðlar undir alt virksemi á Tøknideildini, sum fevnir um framleiðslu, rakstur, innlegging og eltøkni.

Vit søknast eftir einum maskinverkfrøðingi, sum er nærlagdur, álitandi og hevur góð samstarvsevnir.

At fylgja við í tøkniligu menningini og velja, íverkseta og taka í nýtslu nýggja útgerð er partur av arbeiðsuppgávunum hjá maskinverkfrøðinginum.

Vit ynskja at tú hevur útbúgving sum maskinverkfrøðingur. Kunnleiki til og royndir við 2- og 4-takts motorum, vatnturbinum og vindmyllum, brenni- og smyrjievnum, viðlíkahaldsskipanum og øðrum stýriskipanum, eins og royndir við útbjóðing er góð barlast í hesum starvinum.

Maskinverkfrøðingurin vísir til leiðaran á Verkfrøðingadeildini, men arbeitt verður eisini í tvørgangandi verkætlanarbólkum og toymum.

Starvið er lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Akademikarafelag Føroya.

Hevur tú hug at taka av hesi avbjóðing, er tú vælkomin at senda umsókn við prógvum og øðrum til SEV. Freistin at søkja er mánadagin 25. august 2008 kl. 12.

Hevur tú spurningar, er tú vælkomin at ringja til Finn Jakobsen, deildarstjóra á telefon 346800.



**www.sev.fo**

Elfelagið SEV • Postboks 319 • 110 Tórshavn

Lesið Sosialin

# Íbúð til leigu

Íbúð til leigu Undir Heygnum, í Havn.

2 kømur. Stova og køkur í einum.

Frítt og gott útsýni.

**Ip@ognir.fo ella tlf. 21 73 00**
**www.ognir.fo**

# STONGT

Vit hava stongt í viku 31

Opið verður aftur, sum vanligt mánadagin, 4. august

**Fønix**

Á Hjalla 20 Tlf. 31 16 31

Skrivstova felagsins er stongd frá mánadegnum 28. juli til og við fríggjadagin 1. august 2008.

Frá 4 -29. august, verður telefonin bert tikin frá kl. 13.00 til 16.00, vegna summarferiu

**Føroya Arbeiðarafelag**